# – Ein tími føldist sum tveir

**Nemingarnir í Fuglafirði eru ójavnir á máli um tónleikin hjá "føroyska" bólkinum. Onkur helt at teir spældu sera væl, meðan onkur annar mundi sovnað!**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** - Puha, gott at koma út aftur í fríska luft!

Tær seks genturnar hava brúkt – ella sum onkur teirra segði spilt – ein heilan tíma í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Skúlin hevði skipað soleiðis fyri, at teir eldru flokkarnir skuldu fáa høvið at lurta eftir tónleiki við føroyskum ískoyti: Tónleikabólkin "A Kind of B ... Quartet" úr Boston í USA.

Við í bólkinum er nevniliga ein føroyingur, Bjarki Meitil, sum fegin ynskti at vísa føroyingum nakað av tí tónleikinum, hann fæst við undir lesnaði sínum overthere.

Hetta er øðrvísi tónleikur enn tann hjá Britney Spears, Nik og Jay, Brian McFadden og øðrum kendum nøvnum, sum eru frammi í tíðini.

Og tey ungu í Fuglafirði eru ikki bangin fyri at siga sína hugsan um tónleikin, tá Sosialurin leggur leiðina framvið Mentanarhúsinum um middagsleitið fríggjadagin.

– Hatta tók vistnokk EIN tíma, men tað føldist sum vit sótu harinni í minst tveir tímar, sigur ein av nemingunum.



*Hesar seks genturnar úr 7. flokki í Fuglfjarðar skúla - frá vinstru: Lis Højgaard, Maria Olsen (í 9. flokki), Durita Mohr Jacobsen, Lilja Hansen, Helena Midjord og Dina Pállsdóttir – halda ikki, at tónleikurin júst var nakað, sum tær vanliga høvdu tímað at lurta eftir*

*Mynd: Bárður*

### Upplivilsi

Teir fýra tónleikararnir hava staðið á pallinum, og hava gjørt sítt ítarsta fyri at geva hesum ungu tónleikahugaðu fuglfirðingunum eitt tónlistarligt upplivilsi.

Men ójavnt er, hvussu móttøkan av hesi framførsluni hevur verið:

– Botnvánaligt, hoyrist onkur siga úr gongini.

– Nei, hatta var í fínasta lagi. Eg haldi, at guittarleikarin og hasin Bjarki spældu øgiliga væl, sigur ein annar nemingur.

Ikki ber til at fáa orð á hesar báðar nemingarnar fyri at fáa eina nærri útgreining, tí svongdin dregur teir helst heim til mammu, nú døgurðin stendur fyri framman.

Nakrar gentur í 7. og 9. flokki standa kortini enn uttanfyri Mentanarhúsið og tosa um framførsluna.

### TAÐ er tónleikur

Hesar seks genturnar eru eisini á ójavnum máli um, hvussu framførslan var og hvat slag av tónleiki teir spældu fyri nemingunum.

– Hatta – hatta var so ikki tónleikur, sum eg meti sum tónleik. Hatta slagið av tónleiki hevði eg so aldrin tímað at lurta eftir, sigur ein teirra avgjørd.

– Nei, gev mær heldur eina fløgu við bólkinum "KORN" – TAÐ er tónleikur, sigur hon.

Hon verður avbrotin av eini aðrari, sum eisini vil sleppa at siga sína hugsan:

– Ein góður ABBA-sangur hevði bestemt ikki verið av vegnum, sigur hon, og allar hinar skera útí at flenna.

Tær eru í øllum førum samdar um, at tær ikki rættiliga skiltu tónleikin, hóast tónleikararnir uttan iva hava dugað væl at spælt.

### Annar vinkul

Hóast tær eru rættiliga samdar um tónleikin, so er tað kortini ein teirra, sum kemur fram við einum øðrum vinkli uppá støðuna.

– Eg haldi, at tað var ikki soooo øgiliga rotið. Hatta er bara ein heilt serligur stílur, - halda tit ikki eisini tað?!

– Eg haldi, at tað var gott uppá teirra máta. Men hatta er so allíkavæl ikki nakað, sum mær dámar, sigur henda gentan.

Tað var tó eitt, sum henda gentan saknaði, og sum allir bólkarnir, sum hon lurtar eftir, hava – ein sangara.

Her var eingin sangari, bara tónleikur og aftur tónleikur. Einki annað.

– Eg mundi sovnað, sigur ein teirra brádliga.

– Ja, eg sá tað, sigur ein onnur.

– Men eg haldi, at teimum sum dámdi tónleikin, tey livdu rættiliga við.

# Improvisera yvir eitt fast útgangspunkt

**"Føroyskur" bólkur í USA vitjar Føroyar í hesum døgum og spæla m.a. fyri skúlunum kring landið**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*

**Boston-Fuglafjørður:** Bólkurin "A Kind of B...Quartet" hevur spælt saman í einar átta mánaðir.

– Hann varð líkasum skip aður eftir ketureaktiónsskipanini, sigur Bjarki Meitil, sum er føroyska ískoytið í bólkinum.

– Eg kendi trummuspælaran, og hann kendi so aftur ein góðan guitarleikara. Eg havi arbeitt nógv saman við trummuspælaranum, og klaverspælaran kendi eg frá Argentina, tí vit hava spælt saman fyri nøkrum árum síðani.

Bólkurin hevur júst verið í Italien og spælt, og ynsktu at leggja leiðina hendavegin, nú teir kortini vóru í "nánd" av Føroyum.

– Eg vildi fegin koma aftur til Føroyar fyri at spæla okkara tónleik, m.a. fyri fleiri av teimum, sum eg kenni her. Hinvegin so vóru tónleikararnir eisini áhugaðir í at síggja og uppliva Føroyar og føroyingar. Eg haldi, at teimum dámar sera væl her, sigur Bjarki.

### Fáa tónleikin út

Teir hava higartil spælt fyri fleiri skúlum kring landið, m.a. í Havn, á Strondum og í Fuglafirði, og skulu eisini spæla m.a. í Klaksvík.

– Vit hava spælt tónleik, eins og vit hava sagt eitt sindur frá tónleikinum. Høvuðsendamál okkara er at fáa tónleikin út til børn og ung.

– Tónleikur okkara er tað vit kunnu kalla blandingstónleikur: Vit hava eitt fast útgangspunkt úr einum lagi, men improvisera so yvir hetta lagið.

– Uppá tann mátan verður tað einstaka lagið sjáldan framført eins, sigur Bjarki Meitil.



*– Okkara tónleikurin er ein blandingstónleikur, sigur Bjarki Meitil (næst uttast vm), sum er føroyska ískoytið í bólkinum "A Kind of B ... Quartet"*

*Mynd: Bárður*